# Arbeiða ikki feskt á Tvøroyri



**Vesturvarði landaði 140.000 pund til Fiskavirking á Tvøroyri mánadagin.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Fleiri djupvatnstrolarar, sum fiska kongafisk og upsa, hava selt uttanlands, síðan verkfallið byrjaði. Orsøkin er, at skipini fáa ikki tann prís í Føroyum, nú verkfall er, sum tey annars plaga at fáa, tá ið alt er sum vanligt. Ein stórur partur av veiðini hjá djúpvatnstrolarunum fer vanliga av landinum sum fesk fløk, men hetta er meira at kalla ómøguligt, nú verkfall er, og fiskurin ikki fæst til Norrønu, sum siglir av Havnini.

### Arbeiða bara fryst

Fiskavirking á Tvøroyri er høvuðskeypari av kongafiski, og nú møguleikarnir at flyta fiskin feskan av landinum eru nógv skerdir, hevur virkið lagt seg eftir bara at arbeiða frystan fisk. Hetta merkir, at virkið gevur 3-4 krónur minni fyri ráfiskin enn vanligt, og tað meta reiðaríini ikki vera nóg mikið. Tí hava fleiri djúpvatnstrolarar, sum fiska kongafisk og upsa, verið uttanlands við veiðini. Skipini, sum talan er um, eru eitt nú Suðringur, Rankin, Brestir og hvalbiartrolararnir, Steintór og Niels Pauli. Men sum skilst, hava sølurnar uttanlands heldur ikki eydnast serliga væl, tí marknaðurin í eitt nú Týsklandi er lutfalsliga lítil og tolir ikki, at ov nógvur fiskur kemur í senn.

Martin Hentze, góðskuleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at hetta er ein óheppin støða, bæði fyri virkið og skipini.

– Okkara besti útflutningsmøguleiki er Norrøna, men hon liggur í Havn, og ikki ber til at flyta fiskin norður um fjørðin. Annars kemur skipafelagsbátur, Lómur ella Blikur, higar hvørt hóskvøld, men tað er ikki vist, at hetta passar við landingarnar hjá trolarunum. Tí hava vit avgjørt ikki at arbeiða fekst, nú avskipingarmøguleikarnir eru so avmarkaðir.

Góðskuleiðarin sigur, at tá ið feskur fiskur verður sendur av landinum við Norrønu, kunnu tey arbeiða ein dag longri, enn tá ið fiskurin fer við Skipafelagnum.

– Men undir vanligum umstøðum brúka vit sjálvandi báðar møguleikarnar, sigur hann.

*– Norrøna er okkara besti útflutningsmøguleiki til fesk fløk, men her eru vit avskornir, soleingi verkfall er, sigur Martin Hentze, góðskuleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri.*

### Vesturvarði á Tvøroyri

Mánadagin var Vesturvarði á Tvøroyri við umleið 140.000 pundum, meginparturin upsi.

Martin sigur, at upsin er smáur – tað mesta eru 4'arar, so tað tekur langa tíð at fáa hann ígjøgnum maskinurnar.

– Nakað av útróðrarfiski kemur eisini uppá land, og her hava vit ta avtalu við Delta Seafood, at vit taka tann smáa fiskin, meðan Delta tekur tann størra fiskin til saltingar. Hetta samstarv roynist óføra væl, sigur hann.

Martin Hentze sigur annars, at nógvir bátar eru á útróðri, tá ið líkindi eru til tess, men fiskiskapurin er nógv slakari nú, enn hann var, tá ið hann var bestur í vár.

FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2002




Fæst kring alt landið

Sosialurin



# Sandoy Seafood avskipar við Lómi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Sandoyingar hava nú funnið eina loysn, so goymslurnar á virkinum á Sandi og í Skopun ikki gerast fullar, nú verkfall er, og eingin fiskur verður fluttur um Skopunarfjørð.

Farmaskipið, Lómur hjá Skipafelag Føroya, var á Sandi í síðstu viku eftir fiskavørum, og ætlandi var skipið aftur á Sandi hóskvøldið.

– So, nú sleppa vit í hvussu er av við ein part av vøruni, sum liggur á goymslu, siga tey á Sandoy Seafood í Skopun.

Herfyri segði Jóan Petur Vest, at trupulleikin hjá Sandoy Seafood kundi gerast, at goymslurnar gjørdust fullar, um verkfallið bleiv ov drúgt. Men nú er so hesin trupulleikin eftir øllum at døma loystur.

– Tað, sum nú er keðiligt, er, at vit ikki fáa keypt fisk á gólvuppboðssølunum. Higartil hevur hetta ikki havt so stóran týdning, tí nóg mikið av fiski er komið uppá land her suðuri. Men hetta kann gerast ein trupulleiki, sum frá líður.

Í Skopun siga tey, at tað plagar at koma væl við hjá Sandoy Seafood at kunna keypa tað á gólvinum, sum restar í fyri at fáa arbeiði at hanga saman, men hesin møguleiki er ikki til staðar, nú verkfall er, og eingin flutningur er um Skopunarfjørð.




*Verkfallið hjá Føroya Skipara-ogNavigatørfelag ávirkar nú ikki stórvegis avskipingarmøguleikarnar hjá virkjunum í Sandoynni.*

### Mýlingur á Sandi

Týsdagin landaði Mýlingur á Sandi. Meginparturin av veiðini var upsi, men nakað var eisini av toski. Tíverri fingu vit ikki at vita, hvussu nógv Mýlingur hevði hendan túrin.

Nakað av útróðrarfiski kemur uppá land í Skopun, tá ið viðrar, men fiskiskapurin er ikki tann sami nú, sum fyrr í vár.

– Í dag er eingin bátur úti, tí líkindini eru ikki til tess. Onkur bátur var úti mikudagin, men fiskiskapurin var einki serligur, siga tey í Skopun.

Í Sandoynni fegnast tey annars um, at Lómur nú syrgir fyri, at gloymslurnar á virkjunum á Sandi og Skopun ikki gerast fullar.

# Torbjørn toppskorari í Eysturoynni

LØGTINGSVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Størsti atkvøðuslúkurin í Eysturoy á løgtingsvalinum týsdagin var tjóðveldismaðurin, Tórbjørn Jacobsen.

Av teimum tilsamans 1384 atkvøðunum, sum Tjóðveldisflokkurin fekk í Eysturoy, fekk Tórbjørn tær 448, og tað er 4 atkvøður meira enn sambandsmaðurin, Alfred Olsen, sum fekk 444 atkvøður og gjørdist næst størsti atkvøðuslúkurin í oynni.

Á øðrum plássi á tjóðveldislistanum í Eysturoy, gjørdist Hallbjørg A. Hansen í Fuglafirði við 208 atkvøðum, Olaf í Garði Joensen á Eiði á triðja plássi við 158 og Súni í Hjøllum á Toftum á fjórða plássi við 123 atkvøðum. Næstur teimum kom Jóannes K. Eliassen í Leirvík við 113 atkvøðum, Birgir Nónsgjógv Innan Glyvur við 75, Andrea Eldevig í Fuglafirði við 52 og Hallur Ellingsgaard í Oyndarfirði við 18 atkvøðum.



*Tórbjørn Jacobsen á tjóðveldislistanum fekk flestar atkvøður í Eysturoynni, 448 – ella 4 atkvøður fleiri enn sambandsmaðurin, Alfred Olsen.*

# Skjóttgangandi íslendskur útróðrarbátur til Føroya á framsýningarferð

**Báturin, sum kemur til Føroya, er bygdur til Henning Jóhannesson í Grímsoynni. Seigur 1000 gongur 32 míl. Hann er 10 metrar langur, 3 metrar breiður og er merktur 9,3 brt.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Skjóttgangandi íslendski útróðrarbáturin av slagnum, Seigur, kemur nú til Føroya á framsýningarferð. Hetta verður vikuskiftið, 10.-13. mai, og ætlanin er at sigla millum oyggjarnar og vísa bátin fram hetta vikuskiftið.

Ellef Ellefsen umboðar bátin í Føroyum, og hann hevur greitt okkum frá, hvussu skráin fyri vitjanina í Føroyum sær út.

Báturin,sum er ein Seigur 1000, verður vístur fram í Sørvági 10. mai frá kl. 19-23, í Runavík 11. mai frá kl. 14-18, Tórshavn 11. mai frá kl. 20-23 og aftur Tórshavn 12, mai frá kl. 10-12 og í Klaksvík 12. mai frá kl. 16-21.

Ellef sigur, at enn er ikki avgjørt, um farið verður til Sands og Hvalbiar við bátinum, men hetta er uppá tal og verður kunngjørt seinni.

– Verður vánaligt veður á leiðini millum Føroyar og Ísland, tá ið farið verður úr Íslandi, kann henda, at tíðarætlanin í Føroyum verður forskotin eitt sindur. Um so verður, verður sagt frá hesum, sigur Ellef.

Seigur 1000 fer úr Vestmannaoyggjunum, týsdagin 8. mai.




*Nú verður møguligt at síggja snotuliga íslendska útróðrarbátin, Seigur 1000, í Føroyum.*
*– Hetta er skjótasti útróðrarbátur í Íslandi, sigur føroyski umboðsmaðurin, Ellef Ellefsen.*

### Føroyskar snellur

– Báturin, sum kemur til Føroya, er bygdur til Henning Jóhannesson í Grímsoynni, og hetta er skjótasti útróðrarbátur í Íslandi. Seigur 1000 gongur 32 míl. Hann er 10 metrar langur, 3 metrar breiður og er merktur 9,3 brt.

Ellef sigur, at báturin er ógvuliga rúmligur; dekkið er nevniliga 18 fermetrar stórt.

– Henning hevur valt at hava 6 føroyskar Oilwindsnellur í bátinum. Hann hevur eisini línuspæl, og tað er gjørt í Íslandi.

Motorurin er ein Yanmar 6CX-GTE 2, og hann er 500 hk.

– Seigur 1000 hevur eisini bógskrúvu og er lættur at arbeiða við.

Ellef sigur, at nógv »luksus« er í lugarinum, eitt nú el-komfýrur, sjónvarp, kuldaskáp og mikroovnur.

– So, her verður nógv at síggja hjá teimum, ið hava áhuga fyri bátum, sigur Ellef Ellefsen.

Seigur 1000 kostar 1,67 milj. krónur.